


*Tríggjar ymiskar rutur eru at velja í. Eyðun Thomsen og makkarin, Joey Clarkson, hava valt bláu rutuna, sum gongur úr Peru umvegis Bolivia til Paraguay*

Thomsen.

Talan verður sostatt um at koma frá A til C umvegis B, og so er tað upp til luttakararnar sjálvar at syrgja fyri, at teir klára hetta.

- Vit fáa eina motorsúkklu við páhangsvogni, eina sokallaða Tuktuk. So skiftast vit at koyra, meðan hin situr í vogninum aftan fyri og hvílir seg, sigur Eyðun Thomsen.

Fyrireikingin liggur í stóran mun í at kanna rutuna gjølla og finna eina leið, har møguligt er at fáa brennievni á motorsúkkluna. Eitt annað er, at finna eina so trygga leið gjøgnum Andesfjøllini, sum til ber.

- Tað er jú ein kend sak, at tað ikki er so friðarligt allastaðni í Suðuramerika. Vit kunnu jú í ringasta føri møta guerilla-hermonnum ella gemenum ránsmonnum, sigur Eyðun Thomsen.

Tað er sjálvandi nakað, sum hann hugsar um, men – sum hann sigur – so er spenningurin og longsulin efrtir at ferðast og uppliva størri enn óttin fyri, at nakað ófrættakent skal henda teimum á vegnum.

- Eg elski at ferðast, staðfestir Eyðun Thomsen.

Tað er nú áleið eitt hálvt ár síðani teir meldaðu til, so teir hava havt rímiliga góða tíð at fyrireika seg mentalt til ferðina
.

## Verja móti sjúkum

Ein partur av fyrireikingunum er at taka koyrikort til motorsúkklu, ein annar partur er at útvega sponsorar til ferðina.

- Eg havi tikið koyrikortið hjá Førarasetrinum, sum eisini hava stuðla mær í hesi ferðini, sigur Eyðun Thomsen.

Og stuðul er rættiliga neyðugur, tí annars skal peningurin koma úr egnum lumma, og tað er ikki altíð bara sum at siga tað.

- Tað er soleiðis, at vit sjálvir skulu fíggja ferðina, og harumframt skulu vit eisini útvega sponsorar til eina upphædd á túsund pund, sum fer til eitthvørt vælgerandi endamál, sigur Eyðun Thomsen.

Eisini Eyðun Thomsen og Joey Clarkson skulu útvega hesi túsund pundini (umleið 8.500 krónur) og velja ein vælgerandi felagsskap at lata peningin til.

Og teir báðir hava valt felagsskapin Operation Smile, sum hevur til endamáls at hjálpa børnum í Suðuramerika at liva eitt betri lív.

- Annars er tað ikki tann stóra pakkingin, ið skal til fyri at verða við á hesum túrinum.

Tað er ein lítil ryggsekur við tí allarmest neyðuga og eitt tjald, og so avstað, sigur Eyðun Thomsen.

Eitt annað, sum er alneyðugt, áðrenn farið verður at ferðast í fremmandum og øðrvísi londum, eru vaccinatiónir av øllum handaslag.

- Eg havi fingið fimm ymsar sproytur fyri alt møguligt, umframt eina rúgvu av tablettum, sum eg havi tikið fyri at verja meg móti øllum teimum ókendu sjúkum á okkara leiðum, sum vit kunnu koma út fyri undir øðrum himmalhválvum, sigur Eyðun Thomsen.

Hinvegin hevur ikki verið neyðugt hjá honum at útvega sær visa.

- Tað er ikki neyðugt fyri at ferðast á hasum leiðum, sigur Eyðun Thomsen.

## Tríggjar vikur

Sambært Eyðuni Thomsen eru stóru miðlarnir í Onglandi sera áhugaðir í hesum túrunum.

- Í fjør fylgdi BBC TV við einum av hesum túrunum, og gav síðani sendingina út á einari DVD, og tað var sera væl móttikið, sigur Eyðun Thomsen.

Hann velur at fokusera upp á tað positiva, og nú hann fer avstað úr Føroyum sunnudagin, er hann so væl fyrireikaður, sum tilber.

- Familja og vinir hildu meg vera skít svakan, tá eg hevði meldað til, men tey hava nú góðtikið hetta, sigur Eyðun Thomsen.

Teir báðir skulu koyra einar 3000-4000 kilometrar gjøgnum Andesfjøllini, men kortini er ferðin sett til at taka ikki meiri enn tríggjar vikur.

Felagið, sum skipar fyri, hevur sjálvandi royndarkoyrt rutuna, og teir hava síðani ásett tíðina. Men sjálvandi kann ferðin fara at taka nakað longri tíð, tað veldst alt um, hvussu umstøðurnar verða.

Regntíðin er byrjað, og tað kann hava stóra ávirkan á ferðina, og tí mugu teir báðir verða fyrireikaðir upp á glopraregn, kavvastorm ella stóra vindmegi.

- Veðrið er ógvuliga óstøðugt hesa ársins tíðina, so vit eru fyrireikaðir upp á alt, sigur Eyðun Thomsen.

Túrurin gjøgnum Andesfjøllini er ikki bara sum at siga tað. Bara tað at koma vegin fram til Santiago í Chile krevur sín mann.

- Eg flúgvi úr Keypmannahavn til París og hagani til New York áðrenn leiðin gongur til Santiago í Chile. Hetta er ein túrur, sum tekur 22 tímar, sigur Eyðun Thomsen.

Tað er meðan ein er ungur, at ein skal ferðast og uppliva, og tíðin nú er hin rætta, heldur 22 ára gamli Eyðun Müller Thomsen.

Meira kann lesast um ferðina á www.mess.fo/tuktuk

Tey, ið vilja stuðla tiltakinum, kunnu flyta pening á konto hjá Eyðun Müller Thomsen í Eik Banka 9181 4270683



*Soleiðis síggja tær sonevndu Tuktuk út, sum teir báðir skulu koyra gjøgnum Andesfjøllini við*